NUMO

# Havnar Bóltfelag

**Gundadalur**

**100 Tórshavn**

## Ársfrásøgn fyri 2023

**V-tal: 345 385**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á ársaðalfundi felagsins, tann ____ / ____ 2024.

______________________________

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðsluátekning | 3 |
| Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara | 4 |
| Leiðslufrágreiðing | 7 |
| Nýttur roknskaparháttur | 8 |
| Rakstrarroknskapur | 11 |
| Fíggjarstøða | 12 |
| Peningastreymsyvirlit | 14 |
| Notur til ársroknskapin | 15 |

# Upplýsingar um felagið

| | |
|---|---|
| **Felagið** | Havnar Bóltfelag<br>Gundadalur<br>Postboks 1333<br>FO-100 Tórshavn |
| **Felagsháttur** | Ítróttarfelag |
| **V-tal** | 345 385 |
| **Roknskaparár** | Roknskaparár: 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Ransin N. Djurhuus, formaður<br>Lars Muller, næstformaður<br>Finn Jensen, kassameistari<br>Jóannes Mouritsen, skrivari<br>Símun Samuelsen, nevndarlimur |
| **Grannskoðan** | NUMO,<br>góðkent grannskoðanarvirki Sp/f<br>Postsmoga 1165<br>FO-110 Tórshavn |

## Leiðsluátekning

Leiðslan hevur í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 1. januar - 31. desember 2023 hjá fótbóltsfelagnum Havnar Bóltfelag.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini, og uppsetingin er tillagað eftir krøvunum í reglugerðini 'Loyvisreglugerð 2024' hjá loyvisskipanini hjá FSF.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2023, umframt av úrsliti felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur eftir okkara fatan eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin viðvíkur.

Tórshavn, tann 1. februar 2024.

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Rasmin N. Djurhuus<br>formaður | Lars Muller<br>næstformaður | Finn Jensen<br>kassameistari |
| Jóhannes Mouritsen<br>skrivari | Símun Samuelsen<br>nevndarlimur | |

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

*Til nevndina í Havnar Bóltfelag*

## Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá fótbóltsfelagnum Havnar Bóltfelag fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymsuppgerð og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini og uppsetingin er tillagað eftir krøvunum í reglugerðini 'Loyvisreglugerð 2024' hjá loyvisskipanini hjá FSF.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi felagsins og peningastreymi í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2023 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum".Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøða.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

### Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðaralógini, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni, eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda fram við rakstrinum.

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapinum, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiði er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 1. februar 2024.

NUMO,
góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Súni Schwartz Jacobsen
statsaut. revisor

# Leiðslufrágreiðing

## Endamál og høvuðsvirksemi

Endamál og høvuðsvirksemi felagsins er at íðka fótbólt.

## Gongdin í árinum

Rakstrarroknskapur felagsins fyri 2023 vísir eitt avlop á 2,5 mió. kr., og felagsins fíggjarjavni pr. 31. desember 2023 vísir eina eginogn á 6,8 mió. kr.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá roknskaparloki til í dag er einki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársfrásøgn felagsins.

# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Havnar Bóltfelag fyri 2023 er gjørd eftir ásetingunum fyri fyritøkur í flokki B í ársroknskaparlógini. Umframt krøvini í ársroknskaparlógini er ársfrásøgnin gjørd eftir ásetingunum í reglugerðini 'Loyvisreglugerð 2024' hjá loyvisskipanini hjá FSF.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

Upphæddirnar í ársfrásøgnini eru í donskum krónum (DKK).

**Um innrokning og virðisáseting**
Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar í stigum, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavnan av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allar útreiðslur, herundir av- og niðurskrivingar innroknaðar.

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiserað útveganarvirði, har ein støðug effektiv renta verður innroknað yvir tíðarskeiðið. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur frádrigið møguligan avdrátt, umframt ískoyti/frádrátt av akkumleraðu amortiseringini av muninum millum kostprís og nominelt virði.

Við innrokning og máting verður atlit tikið til væntað tap og váðar, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapur

**Inntøkur**
Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum selt verður.

# Nýttur roknskaparháttur

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførur svarandi til rakstrarárið.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður fevnir um veitingar og lønir umframt kostnað, sum hava við løn at gera.

**Av- og niðurskrivingar**
Av- og niðurskrivingar fevna um ársins av- og niðurskrivingar uppá materiella støðisogn.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarinntøkur og –kostnaður verða tikin við í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum hava við roknskaparárið at gera.

## Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð.

Kostprísurin er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini og til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 30-50 ár | 5.000.000 kr. |
| Rakstrartól og innbúgv | 10-25 ár | 20 % |

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum tapum.

**Tíðaravmarkingar**
Tíðaravmarkingar verða gjørdar fyri allar týðandi inntøkur og kostnaðir.

# Nýttur roknskaparháttur

**Skuld**
Við lántøku verður lániskyldan innroknað sum móttikin upphædd við frádrátti við staðfestum transaktiónskostnaðum. Síðani verða fíggjarliga skyldur virðisásetta til amortiseraðan kostprís svarandi til kapitaliserað virði við nýtslu av tí effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttknað upphædd og áljóðandi virðið verður innroknað í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís svarandi til áljóðandi virði.

**Skattur**
Felagið fekk skattafrælsi 1. januar 2000.

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| Atgongumerkjasøla | 1 | 525.316 | 397.164 |
| Stuðulsavtalur og lýsingar | 2 | 2.471.511 | 6.345.600 |
| Handil (søla, tiltøk vm.) | 3 | 0 | 0 |
| UEFA solidaritetur og vinningur frá kappingum | | 2.851.969 | 3.138.984 |
| Vinningur við sølu støðisogn | 4 | 4.226.000 | 0 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | | 1.731.707 | 1.319.921 |
| **Inntøkur** | | **11.806.503** | **11.201.669** |
| Sølukostnaður | 5 | -17.027 | -19.487 |
| Aðrir rakstrarkostnaðir | 6 | -2.859.357 | -2.772.380 |
| **Bruttovinningur** | | **8.930.119** | **8.409.802** |
| Starvsfólkakostnaður | 7 | -6.122.557 | -6.116.053 |
| **Rakstrarúrslit** | | **2.807.562** | **2.293.749** |
| Av- og niðurskrivingar av støðisogn | 8 | -100.571 | -161.377 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarliga postar** | | **2.706.991** | **2.132.372** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 0 | 0 |
| Fíggjarligar útreiðslur | | -170.286 | -264.414 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **2.536.705** | **1.867.958** |
| Skattur av ársúrslitinum | | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **2.536.705** | **1.867.958** |

# Fíggjarstøða pr. 31. desember 2023

## Ogn

| | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| Bygningur | | 0 | 7.774.000 |
| Onnur rakstrartól og innbúgv | | 1.128.090 | 1.207.586 |
| **Materiell støðisogn** | 8 | **1.128.090** | **8.981.586** |
| **Støðisogn tilsamans** | | **1.128.090** | **8.981.586** |
| **Vørugoymsla** | | **10.000** | **10.000** |
| Áogn av sølu og tænastu | | 71.869 | 134.571 |
| Áogn hjá samtakseindum og øðrum nærstandandi pørtum | | 12.300.000 | 0 |
| Áogn frá leikaraflyting | | 0 | 0 |
| Onnur áogn | | 20.000 | 26.000 |
| **Áogn** | | **12.391.869** | **160.571** |
| **Tøkur peningur** | | **0** | **0** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **12.401.869** | **170.571** |
| **Ogn tilsamans** | | **13.529.958** | **9.152.157** |

# Fíggjarstøða pr. 31. desember 2023

## Skyldur

| | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| Flutt frá undanfarnum árum | | 6.783.619 | -3.124.013 |
| Uppskrivingargrunnur | | 7.370.927 | 7.370.927 |
| Afturføring av uppskriving ísv. sølu av bygningi | | -7.370.927 | 0 |
| **Eginpeningur** | 9 | **6.783.619** | **4.246.914** |
| Lánistovnar | | 1.804.793 | 1.957.597 |
| **Langfreistað skuld** | 10 | **1.804.793** | **1.957.597** |
| Avsetingar | | 0 | 0 |
| **Avsetingar** | | **0** | **0** |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 10 | 183.223 | 178.740 |
| Lánistovnar | 11 | 1.694.157 | 1.396.419 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 1.927.037 | 952.633 |
| Skuld til samtakseindir og nærstandandi partar | | 1.086.860 | 313.746 |
| Skuld frá leikaraflyting | | 0 | 0 |
| Skuld til starvsfólk | | 0 | 0 |
| Skuld til sosialar- og skattamyndugleikar | | 23.756 | 45.346 |
| Tíðaravmarking | | 1.800 | 7.800 |
| Onnur skuld | | 24.712 | 52.962 |
| **Stuttfreistaðar skyldur** | | **4.941.546** | **2.947.645** |
| **Skuld tilsamans** | | **6.746.339** | **4.905.242** |
| **Skyldur tilsamans** | | **13.529.958** | **9.152.157** |

## Peningastreymsyvirlit

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Úrslit áðrenn rentur | 2.706.991 | 2.132.372 |
| Vinningur við sølu støðisogn | -4.226.000 | 0 |
| Avskrivingar | 100.571 | 161.377 |
| **Peningastreymur frá primerum rakstri áðrenn broytingar í arbeiðskapitali** | **-1.418.438** | **2.293.749** |
| Broyting í áogn | -12.231.298 | 478.743 |
| Broyting í ognarum | 974.404 | 359.891 |
| Broyting í aðrari skuld | -55.840 | -64.514 |
| **Peningastreymur frá primerum rakstri** | **-12.731.172** | **3.067.868** |
| Rentuútreiðslur | -170.286 | -264.414 |
| **Peningastreymur frá rakstri** | **-12.901.458** | **2.803.454** |
| Søla av materiellari støðisogn | 12.000.000 | 0 |
| Keyp av materiellari støðisogn | -21.074 | -181.135 |
| **Peningastreymur frá íløgum** | **11.978.926** | **-181.135** |
| Upptøka ella hækkan av láni frá fíggjarstovni | 0 | 0 |
| Afturrindan av langfreistaðari skuld til fíggjarstovn | -373.321 | -213.116 |
| Broyting í láni frá eigara ella nærstandandi parti | 773.114 | -14.855 |
| Broytingar í tøkum peningi frá fígging | 0 | 0 |
| **Peningastreymur frá fígging** | **399.794** | **-227.971** |
| **Peningastreymur tilsamans fyri tíðarskeiðið** | **-522.739** | **2.394.348** |
| Tøkur peningur/kredittur við ársbyrjan | -1.171.418 | -3.565.766 |
| Tøkur peningur/kredittur við árslok | -1.694.157 | -1.171.418 |

# Notur

| | | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| **1** | **Atgongumerkjasøla** | | |
| | Heimligu kappingar | 462.212 | 380.747 |
| | UEFA-Kappinging | 63.104 | 16.417 |
| | | **525.316** | **397.164** |
| **2** | **Stuðulsavtalur og lýsingar** | | |
| | Høvuðsstuðlar | 295.934 | 369.200 |
| | Lýsingar við vøllin | 247.000 | 268.500 |
| | Aðrar stuðuls- og lýsingarinntøkur | 1.928.578 | 5.707.900 |
| | | **2.471.511** | **6.345.600** |
| **3** | **Handil (søla, tiltøk vm.)** | | |
| | Heimligu kappingar | 0 | 0 |
| | | **0** | **0** |

**4 Vinningur við sølu støðisogn**

Felagið hevur í árinum selt bygningin á matr. nr. 1268a, Tórshavn.
Ein 10 ára operationel leiguavtala er undirskrivað við keyparan.

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Roknskaparligur vinningur við sølu støðisogn | 4.226.000 | 0 |
| | **4.226.000** | **0** |

| | | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| **5** | **Sølukostnaður** | | |
| | Vørukeyp | -17.027 | -19.487 |
| | | **-17.027** | **-19.487** |

# Notur

| | | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| 6 | **Aðrar rakstrarkostnaðir** | | |
| | Útreiðslur á leikdegi | -710.131 | -456.723 |
| | Útreiðslur til stuðlar og lýsingar | -15.800 | -13.057 |
| | Útreiðslur av materiellum ognum | -429.982 | -492.814 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | -1.703.444 | -1.809.786 |
| | | **-2.859.357** | **-2.772.380** |
| 7 | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | **Leikarar** | | |
| | Lønir | -2.802.254 | -2.522.995 |
| | Lønartengd gjøld | -273.432 | -272.096 |
| | | -3.075.686 | -2.795.091 |
| | **Onnur starvsfólk** | | |
| | Lønir | -3.116.871 | -3.320.962 |
| | Lønartengd gjøld | 0 | 0 |
| | Lønarendurgjøld | 70.000 | 0 |
| | | -3.046.871 | -3.320.962 |
| | | **-6.122.557** | **-6.116.053** |

# Notur

| 8 Materiell støðisogn | Bygningar | Onnur rakstrartól og innbúgv | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Keypsvirði við ársbyrjan | 8.278.873 | 1.604.237 | 9.883.110 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 21.074 | 21.074 |
| Frágongd í árinum | -1.279.073 | 0 | -1.279.073 |
| Almennur studningur við ársbyrjan | -6.999.800 | 0 | -6.999.800 |
| Keypsvirði við árslok | 0 | 1.625.311 | 1.625.311 |
| | | | |
| Uppskrivingar við ársbyrjan | 7.370.927 | 0 | 7.370.927 |
| Uppskrivingar við árslok | 0 | 0 | 0 |
| | | | |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | -876.000 | -396.651 | -1.272.651 |
| Afturvunnar avskrivingar | 876.000 | 0 | 876.000 |
| Av- og niðurskrivingar í árinum | 0 | -100.571 | -100.571 |
| Av- og niðurskrivingar við árslok | 0 | -497.222 | -497.222 |
| | | | |
| **Roknskaparligt virði** | **0** | **1.128.090** | **1.128.090** |
| | | | |
| Avskrivingartíðarskeið | 30-50 ár | 10-25 ár | |

Felagið hevur selt bygningin í árinum, og hevur í hesum sambandi ein roknskaparligan vinning á 4,2 mió. kr.

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **9 Eginpeningur** | | |
| Uppskrivingarburturleggingar | 7.370.927 | 7.370.927 |
| Afturføring av uppskriving ísv. sølu av bygningi | -7.370.927 | 0 |
| | 0 | 7.370.927 |
| Fluttur vinningur við ársbyrjan | -3.124.013 | -4.991.971 |
| Afturføring av uppskriving ísv. sølu av bygningi | 7.370.927 | 0 |
| Ársúrslit | 2.536.705 | 1.867.958 |
| Fluttur vinningur við ársenda | 6.783.619 | -3.124.013 |
| **Eginpeningur ultimo** | **6.783.619** | **4.246.914** |

## Notur

**10 Langfreistað skuld til lánistovnar**

Avdráttir, sum fella til gjaldingar innan 1 ár, eru tiknar við undir stuttfreistaðari skuld. Aðrar skyldur eru innroknaðar undir langfreistaðari skuld.

Skyldurnar fella til gjaldingar í hesi raðfylgju:

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Eftir 5 ár | 1.109.002 | 1.186.953 |
| Millum 1 og 5 ár | 695.791 | 770.644 |
| Langfreistaður partur | 1.804.793 | 1.957.597 |
| Innan eitt ár | 183.223 | 178.740 |
| | **1.988.016** | **2.136.337** |

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **11 Lánistovnar** | | |
| Kassakredittur | 1.694.157 | 1.171.419 |
| Onnur lán | 0 | 225.000 |
| | **1.694.157** | **1.396.419** |

12

**Veðsetingar, trygdarveitingar og eventualskyldur**

Sum trygd fyri skuld til lániveitarar, er veitt veð í fastogn fyri t.kr. 10.000, sum hevur eitt roknskaparligt virði tann 31. desember 2023 upp á t.kr. 0.

# Notur uttan tilvísing

**Kapitalpartar**
Felagið hevur ikki gjørt íløgur í kapitalpartar í øðrum feløgum.

**Avsetingar**
Felagið hevur ongar avsetingar gjørt.

**Ráðandi felag**
Onki annað felag hevur ræði á ella stýrir felagnum

**Transaktiónir við nærstandandi partar**
Felagið hevur ikki havt transaktiónir við nærstandandi partar í roknskaparárinum, sum ikki hava verið til marknaðartreytir.

Aðrir upplýsingar

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Gjald til leikaraumboðsfólk | 0 | 0 |
| Fíggjarlig rættindi hjá leikarum | 0 | 0 |
| Skattaútreiðslur | 0 | 0 |
| Annað | 0 | 0 |
| **Aðrir upplýsingar tilsamans** | **0** | **0** |